# Atlantic Petroleum kann framleiða olju í Norðsjónum

**Ensku myndugleikarnir hava góðkent útbyggingarætlan fyri Chestnut feltið í enskum øki, sum Atlantic Petroleum er partur av**

TÍÐINDASKRIV

P/F Atlantic Petroleum hevur, saman við Venture Production og Bow Valley, fingið góðkenning frá Department of Trade and Industry (enska vinnumálaráðnum) til at útbyggja Chestnut feltið, ið liggur í teigi 22/2a í enskum øki. Atlantic Petroleum eigur 15% í loyvinum.

Chestnut verður útbygt við einum flótandi framleiðslupalli, SSP300, ið norska felagið Sevan Marine eigur. Hetta er eitt nýtt slag av framleiðslupalli, ið eftir ætlan fer til verka á Chestnut í 3. ársfjórðingi 2007.

Mett er at millum seks og nýggju milliónir tunnur av olju kunnu útvinnast úr feltinum, og verður fyrsta framleiðsla síðst í 2007. Av hesum er parturin hjá Atlantic Petroleum millum 900.000 og 1.350.000 tunnur. Dagliga framleiðslan verður við byrjan umleið 1.400 tunnur um dagin til Atlantic Petroleum.

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum:

"Vit eru sera fegin um at hava fingið góðkenning til at útbyggja Chestnut feltið. Hetta er fyrsta útbygging, ið Atlantic Petroleum luttekur í, og tí er góðkenningin eisini ein hornasteinur í søgu felagsins. Somuleiðis er góðkenningin søgulig fyri oljuframleiðslu í Norðsjónum, av tí at Chestnut er eitt tað minsta sjálvstøðuga feltið, ið higartil verður útbygt í Norðsjónum. Útbyggingin av Chestnut passar væl til vinnuætlanina hjá Atlantic Petroleum, sum er at luttaka í útbyggingum av minni feltum í Norðsjónum.

Við at nýta flótandi framleiðslupallin SSP300 hava luttakandi feløgini í Chestnut valt eina útbyggingarloysn ið er nýhugsandi og minni kostnaðarmikil enn higartil nýttar loysnir."




Teigur Navn AP ognarpartur % Fyristøðufelag
Føroyar: 6005/20,25 &
6004/16 Marjun 0,100 (Optión til 5,000) Amerada Hess
Føroyar: 6103/7,8,11,12,13,17 013 40,000 Geysir Petroleum
Føroyar: 6104/9,10,14 014 40,000 Geysir Petroleum
UK: 204/21 P.1027 1,000 (Optión til 2,500) BG
UK: 204/16 & 176/20 P.1029 1.000 (Optión til 2,500) Amerada Hess
UK: 15/21a,b,c Perth 3,750 Nexen
UK: 20/02 & 20/3 Ettrick 8,269/11,0025 Nexen
UK: P.099 110/14d & c West Lennox/Crosby 25,000 Challenger Minerals
UK: 22/02 Chestnut 15,000 Venture

## Um loyvið:

• Luttøkufeløgini í Chestnut feltinum eru:

- Venture Production plc (Operator) - 69,875%
- Bow Valley Petroleum (UK) Limited - 15,125%
- Atlantic Petroleum UK Limited - 15,000%

• Chestnut feltið liggur í teigi 22/2a í enskum øki, umleið 13 km frá Alba feltinum.

• Chestnut feltið varð funnið í 1986, og liggur kolvetnisberandi fláin á umleið 7,000 føtur dýpi. Fleiri avmarkingarbrunnar eru boraðir, og í 2001 vóru umleið 1 millióntunnur av olju royndarframleiddar úr feltinum. Við hesi royndarframleiðslu kundi staðfestast nærri hvussu stórar nøgdir av olju kunnu útvinnast úr feltinum. Sum liður í útbyggingini av Chestnut skal ein nýggjur vatninnsprænigarbrunnur borast í næstum.

## Um Atlantic Petroleum

Atlantic Petroleum luttekur í løtuni í oljuleiting í føroyskum øki, og í leiting og útbygging í enskum øki. Felagið er skrásett á íslendska keypsskálanum (ICEX), við skrásetingarstavunum FO-ATLA.

## Slóðbrótandi pallur

• Sevan Marine ASA er eitt felag ið arbeiðir við nýhugsandi loysnum til frálandavinnuna. Felagið hevur ment ein nýggjan og einfaldari framleiðslupall – SSP300 (Sevan Stabilized Platform)

• SSP300 pallurin ið samtakið hevur leiga til Chestnut feltið er nummar tvey pallur, ið Sevan Marine letur byggja. Hin fyrri er útleigaður til Brasilianska oljufelagið Petrobras S.A. til Piranema oljufeltið í Brasilianskum havøki. Hesin pallur fer væntandi í framleiðslu mitt í 2006.



*Wilhelm Petersen, stjóra*




Lesið
Sosialin
-so eru tit við!